

Mynd: EPA/SCAN FOTO/Hugo BERGSAKER

# Íløguhugurin lækkar í norsku oljuvinnuni

**Jógvan Hugo Gardar**

05.09.2014 - 22:48

Oljan.fo

Íløgurnar í norsku oljuvinnuni kunnu minka við einum fimtingi í 2015. Sambært norsku hagstovuni, Statistisk Sentralbyrå (SSB), vísa tøl sum tey hava frá oljuvinnuni, at færri íløgur verða gjørdar komandi árið.

Í ár hava leitifeløgini sagt at tey gera íløgur fyri knappar 230 milliardir norskar krónur á norska landgrunninum, meðan fyribilsmetingarnar fyri 2015 siga at íløgurnar falla til góðar 185 milliardir krónur.

Hetta merkist sum ringar á sjónum, og kemur at raka aðrar vinnur, serliga hondverkarar, ráðgevarar og ídnaðararbeiðarar. Aftenposten skrivar at hóast íløguhugurin minkar, so eru íløgurnar fyri 2015 framvegis hægri enn tær vóru í 2012.

Hóast tað sær út til at íløgurnar ikki gerast líka stórar í 2015, so kann staðfestast, sambært SSB, at samanhangandi uppgongdin í norsku oljuvinnuni seinnu árini hevur merkt sera góðar tíðir fyri stórar partar av norska vinnulívinum, ið bjóðar fram tænastur til oljuvinnuna.

Norskir myndugleikar gera eina meting av íløgunum fýra ferðir um árið, og tølini broytast alla tíðina. Í løtuni verður mett um íløgurnar lækka við einum fimtingi, so koma eini 6.-7.000 í norsku oljuvinnuni at missa arbeiði í 2015.